# Fýra live-bólkar á pallin

KONSERT

*tíðindaskriv*

Hóskvøldið verður konsert í Kagganum, har fýra væl dámdir bólkar fara at spæla.

Teir fýra bólkarnir eru fløguaktuellu Paradox, sum saman við Lama Sea, Deja Vu og Dreams fara at hava framførslur í staðnum, sum júst hevur fingið eina høvuðsumvæling.

Hetta kvøldið er talan um ókeypis atgongd, og verður byrjað kl. 19.30.

# Minnast teir ið fórust í heimsbardaganum

MINNINGARHALD

Tað eru í ár liðin 60 ár liðin síðan 2. heimsbardagi endaði. Hesin bardagin kostaði okkum dýrt í tapi av menniskjalívum á sjónum.

Í hesum sambandi verður Alla Halgannadagur, minningardagur teirra sjólatnu, í ár eisini ein serligur minningardagur fyri teir, sum fórust á sjónum undir krígnum.

Skráin fyri dagin er henda:

**kl. 15,00:**

Tá verður tann vanliga samkoman, sum plagar at vera kl. 10 fyrst á Sjómansheiminum og síðan við minnisvarðan í Viðalundini, har løgmaður leggur krans.

**kl. 20.00:**

Minningargudstænasta í Havnar Kirkju. Bergur Debes Joensen talar. Aftan á gudstænastuna verða øll boðin til drekkamunn á Sjómansheiminum, Hotel Tórshavn.

Tí bjóðar Hin Føroyska Sjómansmissiónin og Føroya Fiskimannafelag teimum, sum sigldu undir krígnum, til eina samveru við døgurða týsdagin tann 1. november kl. 17 á Sjómansheiminum, Hotel Tórshavn.

Henda innbjóðing umfatar eisini konur, einkjur og neyðug hjálparfólk. Skipað verður so fyri, at farast kann á sjómansheimið aftan á bønarhaldið við minnisvarðan og farast kann í kirkju aftan á samveruna.

Tey, sum hava hug at koma við til hesa samveru eiga í seinasta lagi 28. oktober at boða frá til Føroya Fiskimannafelag. Ringjast kann til tlf. 31 1569, faxast kann til 318769, og teldupostur kann sendast til: fofisk@post.olivant.fo, sigur Hin Føroyska Sjómansmissiónin.

# Ensk ávirkan á føroyskt mál

**Sætti fyrilesturin í røðini, Setrið á ferð, verður í Fuglafirði mikukvøldið, tá Jógvan í Lon Jacobsen fer at halda fyrilestur um mál**

FYRILESTUR

*Jákup Mørk*

Fyrilestrarrøðin er partur av 40 ára føðingardagshaldinum hjá Setrinum, og verður sætti fyrilesturin í røðini á Bókasavninum í Fuglafirði mikukvøldið 19. oktober kl. 20. Tá fer Jógvan í Lon Jacobsen, adjunktur í málfrøði á Føroyamálsdeildini at halda fyrilesturin »Føroyskt í altjóðagerðini - Hugburður til enska ávirkan á føroyskt.«

Fyrilesturin byggir á ein felags norðurlendsku verkætlan »hugburður til ensk tøkuorð í teimum norðurlendsku málunum«. Jógvan hevur gjørt kanningarnar í Føroyum, og fer hann at taka fram nakrar niðurstøður burtúr úr tí kvantitativa partionum av verkætlanini, t.e. úr eini meiningakanning.

Vinkulin er tann samfelagsmálvísindaligi (sosiolingvistiski), og tí er spurningurin: í hvussu stóran mun síggja vit nøkur samfelagslig mynstur í kanningini um nýtslu av og hugburði til ensk orð í føroyskum. Er nakað samband millum mál og samfelag? Er hugburður og nýtsla treytað av samfelagsligari støðu í breiðari merking (inntøka, útbúgving, kyn, aldur, hvar fólk búgva og um fólk hava teldu og internet.)

Jógvan í Lon Jacobsen er mag.art. í norrønari málfrøði frá Fróðskaparsetri Føroya og Københavns Universiteti. Hann hevur verið formaður í málnevndini frá 1998 til 2004. Hann hevur verið í starvi á Fróðskaparsetrinum síðani 1998. Hann er við í eini felags norðurlendskari granskingarverkætlan um enska ávirkan á norðurlandamálini.

Meðan arbeiðssteðgur er verða eingir fyrilestrar í Suðuroy, Sandoy og í Klaksvík. Teir fyrilestrarnir, sum verða raktir av arbeiðssteðginum, verða á skránni seinni í heyst.


## Søluleiðari til Elektron

Elektron er í vøkstri sum veitari av hosting- og breiðbandstænastum, og vit søkja tí ein søluráðleiðara at fyriskipa marknaðarføringina og søluna til serliga vinnufyritøkur og almennar stovnar.

Sjálvt um marknaðurin er lutvís nýggjur, eru tænasturnar vit bjóða ikki. Vit hava í eitt langt áramál veitt ambætara- og skipanarrakstur umframt nettænastur til okkara kundar.

Talan er um nýstovnað starv, ið verður sera spennandi og avbjóðandi fyri rætta persónin og vit kunnu lova góðar starvsfelagar, sum altíð eru fúsir at hjálpa og vegleiða.

Vit rokna við at tú hevur hóskandi útbúgving og royndir frá samsvarandi starvi. Tað er týdningarmikið at tú hevur áhuga í og skil fyri tøkni og dugir at orða teg í skrift og talu.

Hevur hetta tín áhuga kanst tú senda eina umsøkn við prógvum og c.v. til Niels Chr. Nolsøe, P/F Elekron, Staravegur 9, 110 Tórsavn, ella við telduposti til ncn@elektron.fo. Umsøknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. oktober 2005.

Hevur tú spurningar viðvíkjandi starvinum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Niels Chr. Nolsøe. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.




P/F Elektron er heildarveitari av KT-tænastum. Okkara kundar eru m.a. føroysku peningastovnarnir, Toll- og Skattastova Føroya, Arbeiðsloysisskipanin og Almannastovan. Størstu partaeigararnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsstýri. Á P/F Elektron starvast umleið 60 fólk og nettosølan var umleið 50 mió. kr. í 2004.

PF ELEKTRON
Staravegur 9 · P.O. BOX 3219
FO-110 Tórshavn
Tel.: +298 34 51 00 · fax: +298 34 51 01
e-mail: info@elektron.fo

Stephanssons Hús

Elektron